# Elin bergtók í Miðlahúsinum




*Elin Heinesen og tónleikarar bergtóku stóru áhoyrarafjøldina í Miðlahúsinum*

**Á konsertini fríggjakvøldið í Miðlahúsinum bergtók Elin Heinesen áhoyrarafjøldina, sum fjølment var møtt upp at hoyra okkara føroyska Bob Dylan**

ÓLAVSØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Klokkan átta í fríggjakvøldið byrjaði konsertin við Elin Heinesen. Eitt fullsett Miðlahús lurtaði bergtikið at, meðan hon framførdi kendar og minni kendar sangir.

Ætlanin var, at Ad Libitum skuldi spæla undir, men teir fingu forfall, og tí vóru aðrir tónleikarar funnir.Og ikki kann sigast, at hesir eru novicir, tí talan var um Paula Hansen á bassgittara, Eyðun Hansen á gittara og Kim Hansen á klaver.

Sangirnir breiddu seg heilt frá góðum gomlum føroyskum slagarum um nýtt tilfar til útlendskar slagarar sum Rose Garden.

Men flestu sangirnir vóru slíkir, sum áhoyrarin kendi seg aftur í. Løgini vóru tey somu, men ofta var teksturin umsettur til føroyskt av Elini sjálvari.

Og sjálvandi var Áarvegurin (Streets of London) millumn sangirnar, Elin framførdi.

Konsertin var í heila tikið sangir av fløguni, sum Elin gevur út í komandi mánað.

Alt í alt ein løta, sum avgjørt fingu fólk í Ólavsøkuhýri – um tey altso ikki vóru tað frammanundan.




*Hvat er ein Ólavsøka uttan útimøti hjá Frelsunarherinum*

# Frelsunarherurin er Ólavsøka

**Eingin Ólavsøka uttan uttanduramøti. Og hvat er eitt uttanduramøti uttan Frelsunarherin**

ÓLAVSØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sum vant hevði Frelsunarherurin uttanduramøti á Ólavsøku, framman fyri H. N. Jacobsens Bókhandil.

Og sum vant var nógv fólk og lurtaði eftir teimum.

Ólavsøkan verður meiri og meiri ein hugna- og drykkjustevna, og tí er tað eisini alt meiri átrokandi, at Frelsunarherurin ger sítt arbeiði sjónligt. Og tað er helst einki at ivast í, at fólk vóna, vænta og rokna við, at Frelsunarherurin heldur síni útimøti á Vaglinum trúliga Ólavsøku eftir Ólavsøku.

Leygarkvøldið var einki undantak í so máta. Frelsunarherurin møtti trúliga upp - og tað gjørdi áhoyrarafjøldin eisini

# Báturin er bústaðurin



*Her sæst so, hvussu familjan Hansen úr Kvívík heldur Ólavsøku – millum annað*

**Alt fleiri og fleiri føroyingar velja at nýta bátar sum kampingvognar. Og á Ólavsøku er hetta meiri sjónligt enn annars**

ÓLAVSØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ólavsøkan, tjóðarhátíð okkara, er tann tíðin á árinum, tá flestu føroyingar fylkjast í Havn. Men ójavnt er, hvussu vit ferðast til Havnar.

Flestu okkara koma við bili ella við ferju til høvuðsstaðin, men onkur er, sum kemur á annan hátt.

Sosialurin vitjaði umborð á einum báti, sum kom úr Kvívík. Bátin eiga hjúnini Petur og Rúna Hansen. Petur er abbasonur gamla Poul Hansen, sum stovnaði heilsølufyritøkuna av sama navni, og til stuttleika kann nevnast, at Rúna framvegis arbeiðir hjá hesi fyritøkuni, meðan Petur er »lovens lange arm«.

Føroyingar brúka alt meiri bátar sum »kampingvognar«, og á Ólavsøku er tað meiri og meiri sjónligt, at so er.

# Borgarstjórin opið hús

**Heðin Mortensen hevði hesa Ólavsøkuna, eins og undanfarnu, opið hús, har øll vóru vælkomin at støkka inn á gólvið**

ÓLAVSØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, sum eftirhondini umfatar ein stóran part av Suðurstreymoy, hevði longu undan tjóðarhátíðini boðað frá í bløðunum, at hann vanliga hevði opið hús á Ólavsøku.

Og mong vóru tey, sum løgdu leiðina framvið hjá Heðini hesar dagarnar.

Borgarstjórin sjálvur hevði víst á, at hann í mangar mátar var »sjálvforsýnandi« við bæði einum og hvørjum av trøðni, bæði tá tað snúði seg um kjøt og egg, og eingin fór heldur út aftur haðani, hvørki svangur ella tystur.

Sosialurin stakk eisini framvið, og borgarstjórahjúnini vóru blíð og tíð. Har vóru alskyns borgarar frá tí minst metta fram til fremstu menn. Sosialurin var eisini væl móttikin, og einki er at undrast yvir, at borgartjórahjúnini sóu seg noydd at tilkalla hjálp frá yngstu dóttrini, sum eisini stillaði upp til myndatøku.



*Borgarstjórahjúnini Heðin og Hjørdis Mortensen við yngstu dóttrini, Guðrun, ímillum sín*